**Spurningur 1**
**Viðvíkjandi manglandi útgreining av skiftiskostnaði**

Í punkti 6 verður víst til ein ikki kunngjørdan "X % skiftiskostnað", sum verður lagdur til grund við metingini av alternativum tilboðum frá Lenovo og Dell.

Kann útbjóðari upplýsa støddina á hesum prosenttalinum ella háttin, sum verður nýttur til at rokna tað út?

Hetta verður serliga spurt í ljósinum av, at dockingstøðir nú í stóran mun byggja á USB-C, sum er ein felags vinnustandardur.

Um prosenttalið ikki verður kunngjørt, verður biðið um eina frágreiðing um

- Hvussu bjóðarar kunnu tillaga og optimera síni tilboð, tá tann avgerandi fíggjarligi metingarparameterin ikki er kendur frammanundan,
- og hvussu hetta er í samsvari við meginreglurnar um gjøgnumskygni og javnviðgerð.

**Svar**
Tað er tilvitað, at Gjaldstovan ikki upplýsir prossenttali. Hetta er fyri at allir veitarar á tann hátt leggja seg eftir at geva teirra besta boð. Gjaldstovan metir at tað er tann mest gjøgnumskygni og ræ ttvísi háttur at uppgerða og saman bera tilboðini.

**Spurningur 2**
**Alternativ framleiðslumerki**

Kann útbjóðari vátta, at ein bjóðari kann bjóða ymiskar framleiðarar á ymiskum vørulinjum undir Windows-bólkunum, til dømis Lenovo á summum vørulinjum og HP á øðrum?

Ella verður væntað, at eitt samlað tilboð verður latið inn, grundað á einans ein framleiðara?

**Svar**

Vit síggja fyri okkum at tað er ein rakstarfyrimunur í einans hava hava eitt merki av teldum, og tí ynskja vit teldur frá einum telduframleiðara.

**Spurningur 3**

**Kravfestingin – CPU'ar**

Eru serlig krøv til Intel-grundaðar CPU'ar?

Ella er loyvt eisini at bjóða inn við AMD-grundaðum CPU'um?

Bjóðari metir, at tað hevði verið ein fyrimunur at nýta eina óhefta benchmark-meting, til dømis PassMark, fyri at tryggja eina objektiva samanbering av arbeiðsorkuni.

**Svar**
Gjaldstovan og dómsnevndin hava ikki fyrihildið seg til aðrar CPU, og fer ikki at gera tað innan tilboð eru innkomin. Í útbjóðingartilfarinum er ásett, at ein veitari kann bjóða annað merki. Tá er tó kravið, at teldan er á sama ella betur støði. Verður ein telda bjóða fram av øðrum merki, fer Gjaldstovan og dómsnevndin at gera hóskandi kanningar, fyri at kunnað samanbera teldurnar rættvíst.

**Spurningur 4**
**Garanti**

Garantiella warranty er ikki nærri tilskilað í útbjóðingartilfarinum.

Hvørja garanti ella tænastustøðu væntar útbjóðari, at teldurnar verða latnar við? T.d.:

- standard framleiðaragaranti,
- onsite-tænasta,
- og í hvussu langa tíð (1 ár, 3 ár ella 5 ár).

**Svar**
Gjaldstovan ynskir ikki at teldur hava warranty. Vit vísa til, at veitarin skal halda viðkomandi lóggávu innan føroyskan keypirætt, tá talan er um sølu av teldum og telduútgerð.

**Spurningur 5**
**Intel Core Ultra**

Intel Core Ultra 5 ella hægri er krav á fleiri farteldum. Kunnu teir bíligaru Intel Core (ikki Ultra) góðtakast?

**Svar**

Vit krevja Intel Core Ultra, tí man fær lægri streymnýtslu, sterkari integreraðan grafikk og stuðul til AI/NPU. Tær teldurnar eru eisini ein nýggjari og meira framtíðartryggjur platformur, sum hóskar betur til komandi Windows- og AI-funktiónir.

Tað vit vita, so er prísmunurin millum Intel Core og Intel Core Ultra lítil og eingin, at fyrimunirnir er størri.

**Spurningur 6**
**Slag av teldu**

Farteldan tann góða 14" her skriva tit Elitebook X G11 14" við touchskermi. HP hevur eina Elitebook sum eitur X – er tað tann tit meina við ? ella stendur X fyri hvat sum helst? Td Elitebook 6 ella 8 ?

**Svar**

Vit meina við eina sum eitur Elitebook X (X stendur ikki fyri nakað annað)

**Spurningur 7**

Ferteldan tann góða 16" har skriva tit eisini Elitebook X – men her kann mann ikki fáa telduna sum eitur Elitebook X telduna í 16" so her gangi eg út frá at tit meina við Elitebook 6 ella 8 ?

**Svar:**

Um tað ikki er gjørligt at fáa eina elitebook X sum 16 tummar, so skal tað verða ein elitebook 8, við somu kravfesting.

**Spurningur 8**

Somuleiðis eru tvær Zbook teldur í útboðnum, men har er rættiliga tunt við krøvum. Hevði tað ikki verði betur/rættari fyri allar partar um har stóð júst hvussu nógv, ram, hdd, grafikort, processor,  osv líka sum tað ger á hinum teldunum?

**Svar**
Okkara meting av einari nøktandi teldu

| | | |
|---|---|---|
| Fartelda til graffikararar | Telda til mynda og video framleiðslu<br><br>Fartelda 16" 2560x1600 400Nits DreamColor, 100% DCI-P3, 120 Hz, Nividia RTX Pro 500 6GB VRAM grafikkort, Win11Pro, Intel Core Ultra 7 356H ella hægri, 64GB ella hægri, 2 TB SSD ella hægri, numeriskt tastatur | HP Zbook 8 G2i , 16 tumma |
| Fartelda til bygningsdeildir | Telda sum kann koyra Revit, AudCad og líknandi<br><br>Fartelda 16" 2560x1600 400Nits 120Hz, Nividia RTX Pro 500 6GB VRAM grafikkort, Win11Pro, Intel Core Ultra 7 356H ella hægri, 64GB ella hægri, 1 TB SSD ella hægri, numeriskt tastatur | HP Zbook 8 G2i, 16 tumma |